# Vit stjala ikki fólk frá Føroya Arbeiðarafelag

*–Ongin verður tvingaður upp í Starvsmannafelagið. Tað, sum hevur størstan týdning, er, at øll fáa rímilig kor og skipað viðurskifti, sigur Gunnleivur Dalsgarð*

Áki Bertholdsen



*– Tað er beinleiðis lygn, at vit taka limir frá Føroya Arbeiðarafelag, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum*

–Ongin verður tvingaður at blíva limur í Starvsmannafelagnum. Tey, sum eru komin uppí, eru komin av fríum vilja.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum tekur sær ikki nær av ábreiðslunum, sum formaðuriní einum øðrum stórum fakfelag, Ingeborg Vinther í Føroya Arbeiðarafelag, setir fram ímóti Starvsmannafelagnum í Sosialinum í gjár.

Ingeborg Vinther skuldsetir Starvsmannafelagið fyri at troka seg inn á fakfelagsøkið hjá Føroya Arbeiðarafelag við at royna at fáa dagrøktarmammur upp í Starvsmannafelagið, hóast tær frammanundan eru limir í Føroya Arbeiðarafelag.

–Eg havi aldrin vitað so óloyala framferð allar mínar dagar sum fakfelagsfólk, segði Ingeborg Vinther.

Tað er blivið so vátt í fakfelagsreiðrinum av hesi orsøk, at Føroya Arbeiðarafelag fer nú at gera støðuna upp, og ein avleiðing av tí kann vera, at arbeiðarafelagið tekur seg burturúr samstarvinum, sum sjey av teimum stóru fakfeløgunum hava í Sjeymannabólkinum.

**Tvinga ongan upp í**

Men hesar atfinningar tekur formaðurin í Starvsmannafelagnum ikki at sær.

–Vit stjala ongar limir tí tey, sum eru komin uppí Starvsmannafelagið, eru komin av fríum vilja, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Hann sigur, at fakfelagsliga hava dagrøktarmammurnar verið forsømdar so tað munar. Og tað er harmiligt, at ein so stórur og týðandi bólkur hevur verið uttan lóg og rætt øll hesi árini.

– Heldur Ingeborg Vinther, at dagrøktarmammurnar hoyra undir í Føroya Arbeiðarafelag, hevur hon havt ríkiligt av tíð til at fáa viðurskiftini hjá teimum í rættlag.

Hann sigur, at tað er Kommunala Starvsmannafelganum í Havn fyri at takka, at hol er sett á, at fáa viðurskiftini hjá dagrøktarmammunum í rættlag.

– Síðani er Kommunala Starvsmannafelagið komið upp í Starvsmannafelagið og harvið hava vit eisini yvirtikið sáttmálaøkini, sum tað hevði frammanundan

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at Starvsmannafelagið hevur eisini sáttmála við aðrar kommunur.

–M.a. hava vit sáttmála við Sørvágs og Skála Kommunu. Og tær hava biðið okkum gera ein sáttmála fyri dagrøktarmammurnar í báðum kommununum við støði í sáttmálanum í Havn.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at tað hevur Starvsmannafelagið so gjørt.

–Síðani hava dagrøktarmannurnar fingið í boði at taka av hesum sáttmála, og tað hava tær gjørt av egnum, fríum vilja.

– Tað hevur ongan týdning, hvar tey hava verið frammanundan og tað havi eg heldur ikki ánilsi av. Tað, sum hevur týdning er, at vit hava gjørt eitt sáttmálauppskot, sum tær sleppa at taka støðu til av egnum vilja.

– Vit hava ikki stolið limir frá Føroya Arbeiðarafelag, tí tað var ongin sáttmáli á økinum frammanundan og tað er tað, sum ger allan munin.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur, at tað, sum hevur størstan týdning, er at dagrøktarmammurnar fáa skipað viðurskifti.

– Og fáa vit sáttmálaviðurskiftini hjá dagrøktarmammunum greið, er tað ein sigur hjá fakfelagsrørsluni.

Hann sigur, at kanska er tað munur á hugburðinum í báðum fakfeløguum.

– Fyri okkum hevur tað týdning at fáa skipað viðurskifti. Vit hava havt eitt grundarlag at gera tað á, og tí hava vit gjørt tað og givið teimum eitt tilboð. Í Føroya Arbeiðarafelag er tað kanska limaskapurin, sum hevur størstan týdningin.

– Men at Føroya Arbeiðarafelag tvíheldur um, at tað „eigur" dagrøktarmammurnar, uttan at gera nakað fyri tær, er heldur ikki rætt.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at teir hava ikki gjørt sáttmála fyri dagrøktarmammur aðrastaðni.

– Men tað eru aðrar kommunur, sum eru áhugaðar og tær fara vit sjálvsagt eisini at kunna um viðurskifti, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

– At Ingeborg Vinther kallar okkum óloyal og skuldsetir okkum fyri at stinga Føroya Arbeiðarafelag í bakið, er ein pláta, sum eg havi hoyrt ofta. Men bæði Ingeborg Vinther og øll onnur vita, hvussu loyalt at Starvsmannafelagið er, og haldi sanniliga eisini, at vit hava sett okkara spor eftir okkum.

Gunnleivur Dalsgarð væntar ikki, at hetta fer at fáa avleiðingar fyri samstarvið í Sjeymannabólkinum.

–Hjá okkum verður ongin trupulleiki at samstarva. Og tá ið fakfelag skulu samstarva á so ólíka grundarlagið, sum vit gera í Sjeymannabólkinum er ein hin fremsta fortreytin, at vit kunnu semjast um, at vit kunnu vera ósamd um ymisk viðurskifti, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

# Kanna fleiri møguleikar á Tvøroyri

*– Ætlanin er, at eftirútbúgvingin av heimahjálpum skal vera kring landið, men øll sjúkrarøktarútbúgvingin verður á Tvøroyri, sigur Torbjørn Jacobsen*

Áki Bertholdsen



*Herfyri var Torbjørn Jacobsen Landsstýrismaður í Skúla- ogmentamálum á Rundferð í Suðuroy og kunnaði seg um viðurskiftini, her er hann saman við býráðsformanninum á Tvøroyri, uppi á takinum á hotellinum á Tvøroyri, har teir hava útsýnið niðan á sjúkrahhúsið, sum fær ein týðandi leiklut nú almanna og heilsuskúlin skal vera á Tvøroyri*

Enn er ikki gjørt av, hvar nýggi almanna- og heilsuskúlin á Tvøroyri skal vera.

Men fleiri møguleikar verða kannaðir og Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur nøkur høli í kikaranum.

Eftir, hvat skilst, er tað tó mest sannlíkt, at skúlin fær høli í kommunuskúlanum úti á Tvøroyri, í somu hølum, har HF helt til í síni tíð, men endalig avgerð er kortini ikki tikin enn.

Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í skúlamálum, sigur, at tað er ivasamt, hvussu heppið tað er at leggja hendan skúlan undir sama tak sum kommunuskúlin er. Men kortini verður hildið, at hølini, sum eru uppá tal, liggja so avsíðis, at tað skuldi ikki verði nakar trupulleiki.

– Men tað verður í Øllum førum bara ein fyribils loysn ímeðan leitað verður eftir eini endaligari loysn.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað verður løgd stór orka í at fáa skúlan á føtur.

–Nú verður arbeitt eftir eini ætlan um, at eftirútbúgvingin av heimahjálpum skal byrja 1. januar og at sjálvur røktarskúlin skal byrja 1. august næsta ár.

Hann sigur, at ætlanin er, at undirvísingin í eftirútbúgvingini skal vera kring landið, so at heimahjálpirnar sleppa frá at flyta.

Men undirvísingin skal kortini stýrast av Tvøroyri.

Hinvegin skal øll undirvísing í sjúkrarøktarskúlanum fara fram á Tvøroyri.

Torbjørn Jacobsen sigur, at tað eru fyri mestan partin tilkomnar konur, sum eru á eftirúbúgvingini og tað verður trupult at fáa tær at flyta heimaní frá ta tíðina, útbúgvingin varar.

Annars leggur hann afturat, at eftir at øll skjøl í sambandi við skúlan eru gjøgnumgingin, kann endaliga staðfestast, at tað er ongin, skrivlig, politisk avgerð tikin um at skúlin skuldi vera í Havn.

–Sostatt er skúlin ikki fluttur úr Havn. Skúlin er stovnsettur á Tvøroyri, sigur Torbjørn Jacobsen.

Í løtuni verður søkt av nýggjum eftir leiðara til skúlan.

– Søkt er eftir leiðara fyrr, men flestu av teimum, sum søktu, hava søkt við teirri fortreyt, at skúlin verður í Havn. Fyri at beina allan iva burtur, verður tískil søkt av nýggjum. Tað ger, at onkur av teimum, sum søktu fyrru ferð, fer kanska ikki at søkja aftur, tí tey hava ikki hug til at flyta til Suðuroyar.

Hinvegin kann tað eisini henda, at onkur, sum kundi hugsað sær at søkt, læt vera, tí at hann skuldi vera í Havn.



# Fíggingarstovnarnir noktaðu at stuðla

*Tá Bødvar Poulsen søkti fígging til snikkaraverkstað í Dali, vildu fíggingarstovnarnir ikki veita lán. Hann bygdi so við vælvild frá teimum, sum hann keypti tilfarið frá*

Edvard Joensen



*Bødvar Poulsen flutti snikkaravirkið úr Havnardali til Dals*

**Mynd: Edvard Joensen**

**Dalur:** Tað hóvar eftir øllum at døma ikki fíggingarstovnunum, at framleiðsluvirki flyta úr miðstaðarøkinum til útjaðaraøki. Hvørki banki ella Útnorðurgrunnurin vildu fíggja snikkaravirkið hjá Bødvari Poulsen í Dali.

Bødvar Poulsen hevði snikkaravirki í Havnardali, men gjørdi av at flyta til Dals, har hann bygdi nýtt virki, sum stóð liðugt í mars í ár. Virkið var bíligt. Ymiskar maskinur og innbúgv hevði hann við sær úr virkinum í Havn, meðan neyðugt sjálvandi var við ávísum nýíløgum.

Bødvar Poulsen sigur, at hann søkti bankafígging, men fekk noktandi svar. Tað var so tað, tað var. Síðan søkti hann Útnorðurgrunnin, sum hann helt var til fyri at stuðla útjaðarafyritøkum. Men eisini haðani kom sera skuffandi svar:

*»Tíverri ber tað okkum ikki til at ganga lánsumsóknini á møti.«*

Eingin grundgeving fylgdi við. Tað var sera hugstoytt, sigur Bødvar Poulsen. Hann hevði annars ta fatan, at júst hesin grunnurin var stovnaður av politikarunum í útnorði til at stuðla fyritøkum í útjaðaranum.

Seinni fekk hann í telefonini at vita frá skrivara grunnsins, at grundin var tann, at virki hansara lá so langt burtur. Men hvørjum tað lá burtur frá, segði søgan einki um.

Hinvegin sigur Bødvar Poulsen, at í dag er hann kortini bara fegin um, at hann onga fígging fekk, hóast tað tá virkaði hugstoytt. Teir, hann keypti tilfar frá, vóru sera lagaligir, og í dag er hann longu komin so væl uppundan, at hann kann gjalda seinastu skuldina til jólar.

Tað ljóðar mestsum ótrúligt, men alt í alt stóð virkið í umleið 400.000,- krónum, tá hann byrjaði at arbeiða. Og arbeiði hevur hann havt ivaleyst av. So nógv, at hann nú noyðist at siga arbeiði frá sær.

Bødvar Poulsen ger trappur á snikkaravirkinum í Dali. Hann sigur, at higartil í ár hevur hann latið 38 trappur, og fleiri eru eftir at gera. Eisini skal hann gera onkran køk, sigur hann.

Trappurnar verða gjørdar lidnar í Dali, og so fer Bødvar sjálvur út at seta tær upp. Hann flytir sjálvur tær flestu í egnum bili. Men tað kemur fyri, at tær eru so mikið stórar, at hann noyðist at nýta Strandferðsluna.

Hóast hann er fluttur til Dals, er tað als eingin trupulleiki fyri virksemið, sigur hann. Sambandið um Skopunarfjørð er gott, letur hann at. Er ikki veður ein dag, fer hann bara dagin eftir. Tað er ikki veri enn so, tá ein arbeiðir einsamallur og kann ráða sær sjálvuum.

Og júst tað frælsið, at kunna gera sum hann vil, er eitt tað besta aktivið í virkinum í Dali, sigur Bødvar Poulsen. Ikki einans hevur hann bygt upp eitt virki, sum sær út til at ganga væl. Hann fær eisini tíð at vera til sjálvur, og tað ber av øllum, sigur hann.

# Dalbingar vilja hava tunnil

*Vegurin til Dals er vandafullur, og einasta trygga loysnin er at gera tunnil til bygdina, siga dalbingar*

Edvard Joensen



*Fyri nøkrum árum síðani leyp undan vegnum*

**Mynd: Edvard Joensen**

**Dalur:** Skal tað vera trygt at ferðast til og úr Dali, er einasta loysnin, at ein tunnil verður gjørdur. So einfalt verður samferðsluspurningurin settur upp í Dali.

Tað liggur ein steinur á vegnum, tá blaðmaðurin er á veg aftur til Húsavíkar eftir at hava vitjað í Dali hendan dagin. Steinurin er nýkomin oman úr berginum. Hann lá ikki har, tá farið varð suður til Dals.

Ikki er hann so øgiliga stórur, steinurin, men so mikið kortini, at kom hann á – ella inn í – bilin, kundi hann elvt til eina vanlukku. Og soleiðis eru umstøðurnar hvønn einasta dag hjá teimum, sum búgva í Dali.

Vegurin millum Dal og Húsavík liggur gjørnum bergið, og har er vandamikið at koyra bæði á sumri og vetri.

Á vetri orsakað av hálku og vandanum fyri skalvalopi eins og øðrum omanlopi. Og um summarið ríður dagliga grót oman yvir vegin. Bæði størri og smærri steinar.

Groth Nolsøe, timburmaður í Dali, sigur, at tað er at kalla ikki dagur, at ikki okkurt kemur á vegin. Og hóast tað enn tíbetur ikki hevur ført nakra beinleiðis vanlukku, kann hon henda hvønn dag, tað skal verða.



*Tað er dagligur kostur, at grót og annað kemur niður úr fjallinum í erva*

**Mynd: Groth Nolsøe**

Tað skal so óalmindilga lítið til, fyrr enn tað endar galið. Ein lítil steinur inn gjøgnum ein rút, sum rakar ein bilførara, og so er vanlukkan hend.

Tað er hent, at steinar eru komnir á bilar og hava oyðilagt bæði rútar og tak.

Og um veturin er tað kavi, sum legst í berginum. Tá kunnu skalvar standa og hótta, og viðhvørt loypa teir og steingja vegin.

Men tað er ikki bara úr erva, at ferðamaðurin eftir Dalsvegnum verður hóttur. Minst líka vandamikið er tað. At tað loypur undan vegnum í neðra.

Vegurin liggur, sum øll vita, gjøgnum bergið, og undirlendið er einki soleiðis at reypa av. Stutt er út á eggina nógvastaðni og beint í havið. Tá so lop eru niðan fyri vegin, kann gerast rættiliga hættisligt at koyra.

Tað eru ikki tey nógvu arbeiðsplássini í Dali, so fólk noyðast at koyra til arbeiðis ymsastaðni í Sandoynni. Og tey seta seg dagliga í ávísan vanda, tá tey ferðast eftir hesum vegnum.

Groth Nolsøe, sum dagliga koyrir eftir Dalsvegnum, sigur, at tað eru nú nógv ár síðan, dalbingar savnaðu undirskriftir, sum vórðu latnar einum tingmanni í oynni, við áheitan á landsmyndugleikarnar um at arbeiða fyri tunnli til Dals. Men ivaleyst er brævið blivið burtur, tí einki hoyrdist aftur, Hvørki orð ella eiður.

Alt hetta tilsamans er nóg ringt, siga dalbingar, sum staðiliga heita á landsmyndugleikarnar, bæði tingmenninar í oynni, samgongu, andstøðu, umframt landsstýrismannin í samferðslumálum um at virka fyri, at tunnil til Dals kemur frammalaga í eini komandi samferðsluætlan.